# Greinkvørn Arborist 150

*Handfaring, brúkarvegleiðing og verndar reglur av greinkvørnini Greenmech Arborist 150.*

Hetta er okkara kæra Greenmech Arborist 150 greinkvørn.

**Greinkvørnin er góð, men kann gerast vandamikil, um ikki tú fer rætt og væl við henni. Tí mugu fylgjandi krøv yvirhaldast.:**

- ***Brúkið altíð verndarbrillur, hjálm, handskar og oyrnavernd (larmurin er yvir 120DB)***
- ***Brennievni er diesel.***
- ***Tekur greinar upp í 15 cm í tvørmát.***
- ***Børn undir 18 ár muga ongantíð betjena greinkvørnina.***

**Fyrireiking:**

- Handskar, brillur, hjálmur við oyraverjum og eygnaverju (visir) er krav.
- Klæðir og handskar mugu sita tætt at kroppinum. Eingi leys pløgg, ið kunnu seta seg føst í kvørnina, sosum hálsturrikløð osf.
- Lat ikki óvikomandi sleppa framat maskinuni og arbeiðsøkinum. Stikk ikki armar ella bein í traktina. Børn, muga ikki verða í nánd av kvørnini tá hon koyrir.
- Lat ikki kvørnina ganga meðan tú fert frá henni - sløkk og tak lykilin við tær.
- Í kvørnini eru tveir hvassir knívar. Gev teim ans. Um tú má reinsa kvørnina so verð í handskum og gáa eftir hvar knívarnir eru.

**Áðrenn tú fert í gongd:**

- Set kvørnina á javnt og slatt undirlendi. Spenn hondbremsuna og set aftara fótin niður.
- Folda traktina niður har greinarnar skulu í.
- Kanna um nokk av olju er á motorinum.
- Tørna lykilin til “on”, tá maskinan floytar trýst og hald á “start” til motorurin startar. Lat motorin koyra 5 minuttir í tómgongd.

**Nú er klárt at flisa**

- Kvørnin er gjørd til træ og bert træ. Ikki til trærøtur, seym, mold, grót osf.
- Tvørmáti skal ikki vera meir enn 15cm.
- Lat maskinuna sleppa at draga greinarnar inn sjálv, ikki trýsta.

- Greinarnar mugu verða passaliga beinar, soleiðis at tær ganga lættliga gjøgnum traktina. Krókutar greinar mugu skerast sundur í passalig bein stykkir.

- Set spidaran í botn og so er klárt at flisa.

**Kontrol barrin**

- Runt traktina er ein reyð stong. Hon stýrir teimum báðum hydraulisku rullunum ið draga greinarnar inn til knívin.

- Um trýst verður á stongina so støðga rullurnar. Á síðuni á traktini eru tveir knøttar ein grønur og ein bláður. Tann grøni er til at starta innføringina. Tann blái knøtturin er til at bakka rullurnar við. Um ein grein ikki gongur gjøgnum so brúkar tú tann bláa knøttin til at fáa greinina út.

**Steðga maskinuni**

- Lat kvørnina koyra tóma eina løtu.

- Hála spidaran aftur. Lat maskinuna koyra eina løtu í tómgongd.

- Set lykilin til off. So er sløkt.